


Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum her saman við deildarleiðaranum á Trygdardeplinum við Áir, Signheðin Davidsen. Myndatøka Jan Müller/oljan.fo

# Vinnuskúlastjóri: Raðfesta samskifti og samstarv við vinnuna

**Jan Müller**

27.03.2014 - 23:16

Oljan.fo

Tað eru bara fáir mánaðir síðani, at Vinnuháskúlin í Havn fekk nýggjan stjóra. Wilhelm Petersen, sum nú stjórnar skúlanum, hevur stórar vónir um at kunna útbúgva fleiri føroyskar yvirmenn til sjóvinnuna heima sum úti. Og her telur frálandavinnan eisini við fyri ikki at siga, at hon hevur høga raðfesting. Men henda vinna setir sera stór krøv til trygdina, og tí sær nýggi stjórin eisini Trygdardepilin við Áir sum eitt týðandi grundarlag fyri at kunna byggja brýr millum skúlan og vinnuna.

Og hann dylur ikki fyri, at tað kemur væl við, tá frálandavinnan eisini vil vera við til at menna skeiðsmøguleikarnar hjá skúlanum og sipar her til teir mongu yvirlivilsisbúnarnar, sum Bourbon Offshore hevur latið skúlanum.

Wilhelm Petersen heldur tað vera sera positivt, at vinnan vísir áhuga fyri Vinnuháskúlanum og hvat skúlin ger.

"Samskifi og samstarv við vinnuna, er nakað vit á Vinnuháskúlanum koma at raðfesta høgt í komandi tíðum."

Hann hevur seinastu vikurnar vitjað á Trygdardeplinum við Áir fyri at fáa eitt neyvari og betri innlit í tey mongu trygdarskeiðini, sum verða bjóðað fram har. Og oljan.fo hevur verið við. Sí m.a. stóra myndafrásøgn frá hesum vitjanum.